# Adieux Paris - et sans regrets Bonjours les Féroé

*Í sambandi við, at tað í dag eru 25 ár síðani, at franski listarmaðurin, Philippe Carré, vitjaði í Føroyum, hevur hann skrivað hesa takkarkvøðu*

23. mai 1975. Tað er í dag, og kortini eru tað 25 ár síðani. Kenslur seta síni spor í minni, og tá ein kensla er so mikið sterk, setur minnið hesa kensluna næstan óbroytta inn í nútíðina.

Hetta var mín 1. flogferð, - úr Kirkwall til Vágarnar. Úr einum óendaligum azurbláum himmali setti flogfarið seg í einum mánakendum gosopi. Luftin møtti ferðamanninum tey fyrstu fetini oman trappurnar við einum heilt óvantaðum frískleika.

Tá eg kom higar 1. ferð, hevði eg ongantíð ímyndað mær nakað tílíkt, so nær í kilometrum, og kortini so fjart, so ørvísi, at tað næstan kom sum ein skelkur.

Tá blaðfólk nú bart út spyrja okkum ferðandi, ið ikki fóru avstað aftur, hvat er so áhugavert her, standa vit næstan málleys, tí listin av sereyðkennum av tí føroyska unisversinum er so langur og so ørvísi, at tú at enda stendur og reksar upp tugdar hugmyndir uttan týdning. Tá tú lítur aftur um bak, spyrt tú teg, hvørjum hesin gandurin stendst av. Hvussu skalt tú tosa um hetta, endurgeva tað og framvegis vera trúgvur móti "gandinum".

Tað er hetta sum er arbeiði hjá teknaranum, rithøvundanum, endurskaparanum. Landið er eitt eindømi við eini styrki, tú ikki ímyndar tær. Náttúran sjálv er listarverkið. Tað kennist átrokandi at endurskapa staðið við eini styrki, ið svarar til staðið sjálvt, so tú kanst royna at fáa onnur at kenna tað sama, sum tú hevur kent.

23. mai 1975. Í sjey dagar skein sólin brennandi heit av hesum azurbláa Miðarahavshimmalinum, og hvørt mannsbarn var úti og neyt hetta hálvgun fatamorgana, har tann kvalandi skuggin, ið vanliga fylgir við slíkum veðrið, var skiftur um við fríska, angandi, krystallklára luft.

1. juni: Kavarok! Nýliga-ani minstist eisini ein útvarpsmaður aftur á hesa meterologisku serhendingina, ið, um ikki skelkaði ferðamannin, so í hvussu so er setti síni djúpu spor í uppfatan hansara av hesum nýggja landinum.

Ferðamaðurin var blindaður av øllum hesum nýggja, ið ikki bara kundi síggjast og kennast, men sum eisini varð ríkað av fjálgari menniskansligari nærveru. Jógvan, Marjun, Kristian, Edward, Jan, Jens, Uni, Conny og hini tendraðu ein vinarligan, bróðurligan loga, sum ikki sløknaði aftur. Vit vóru 20 ár, og í hesi longu ljósu ikki-náttini tyktist dimmalættingin uttan enda. Hetta sunnanfyri so heilt ókenda fyribrigdi skapti eldhuga, lat upp eina nýggja dimensión, tað var ikki neyðugt at fara til songar, dagurin var jú óendaligur. Í cowboyklæðum livdu vit sum mitt í einum western, har tuflurnar hjá genum og dreingjum trampaði dustið upp uttan fyri Zanzibar.

Oyggjarnar hava ein slíka atdráttarmegi, at ert tú fyrst komin higar eina ferð, so kemur tú aftur ár um ár, steðgar ein mánað, so tveir, seinni eitt hálvt ár, so eitt, og at enda búsetur tú teg og heldur á at læra landið at kenna. Tá tú so við og við fært tann lykilin, sum málið er, letur aftur ein nýggjur heimur seg upp fyri tær, tann innari heimurin. Áður var tað meira tann fysiski veruleikin, sum bergtók teg. Ikki fyrr enn tá skilur ferðamaðurin rættiliga samleikan her. Føroyska málið hevur sama skap sum fjallagreinin, vindurin, regnið og ljósið.



*Onkur kennist kanska við onkran á hesum myndunum, sum Philippe Carré tók í 1975*

Tað var fotograferingin, sum hevði mín stóra áhuga, men kortini tyktist tað mær ikki møguligt at vísa, endurgeva, sublimera tað føroyska rúmið. Og her var tað, at eg byrjaði at arbeiða við kliptum pappírspettum, eggjaður av arbeiðinum hjá William Heinesen. Tann føroyska dimensiónin er so mikið serlig, at tað krevur áralangt rannsóknararbeiði at vísa hetta og deila tað við onnur. Listarmaðurin roynir at endurgeva og víðarigeva gleðina og undranina, sum ferðamaðurin hevur av oyggjunum.

Eg vil nýta hetta høvi at bera ein stóra tøkk til øll tykkum sum við tykkara vinsemi, stórtøkni og áhuga hava stuðlað mær í mínum arbeiði og hava loyvt mær at halda á at realisera hendan dreymin um at avmynda Føroyar, - býir og bygdir.

Í dag tann 23. mai kl. 17 í samband við 25 ára dagin spælir Kári Sverrison í



Smiðjuni í Lítluvík, og øll eru hjartaliga vælkomin.

Framsýningin "Á bygd" heldur á til 24. mai kl 20.

**Philippe Carré**







e-mail: jakup@sosialurin.fo

Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum: www.sosialurin.fo

# Klaksvíkingar ætla at gera innrás í Herfølge

*Stórur áhugi er í Klaksvík at fara til Danmarkar komandi sunnudag at síggja Jákup Mikkelsen takast við Toda Jónsson fyri at gerast danskur meistari*



Fótbóltsfepurin í Klaksvík er høgur. KÍ er illa spert. Sunnudagin vóru teir fyri tí eyðmýking frammanfyri heimaáskoðarunum at verða sendir úr steypakappingini av vágamonnum. Vágamenn hava lítil og eingi fótbóltsavrik í fremstu røð at vísa á. Tað hava klaksvíkingar, og tí var eyðmýkingin so mikið størri.

Komandi sunnudag skal KÍ fyri aðru ferð í Gundadal at royna seg í landskappingardysti. Teir skulu spæla móti fyrrverandi felagnum hjá KÍ venjaranum, Tomislav Sivic. B36 er oddalið. Í fjør vann B36 2–0 á KÍ í Gundadali. Tað var í seytjanda og næstsíðsta umfarinum. Smyril sigldi beinleiðis av Klaksvík og til høvuðsstaðin, og tað varð mett, at í hvussu so er einir tólv hudrað klaksvíkingar vóru í Gundadali ta ferðina.

Komandi sunnudag fara so langt í frá eins nógvir klaksvíkingar til Havnar.

### Spennandi danmarkarferð

Men sjálvt um tað higartil hevur gingið meiri enn illa hjá KÍ, og sjálvt um møguleikin at endurvinna løgmanssteypið er fokin, og sjálvt um tað í løtuni sær svart fyri møguleikanum at endurvinna FM heitið, so hava tey har norðuri ein fótbótsmeistaraskap at ganga uppí í hesi vikuni.

Jákup Mikkelsen og Herfølge eru framvegis væl fyri í stríðnum um danska meistaraskapin. Um tað fer at eydnast at vinna gull ella ikki verður endaliga avgjørt komandi sunnudag, og tá ætla fleiri klaksvíkingar sær at vera staddir á Herfølge stadion.

– Fleiri í familjuni og ikki sørt av vinfólkum hjá okkum hava ringt til mín og biðið meg skaffa teimum atgongumerki til dystin. Tað havi eg gjørt, men eg havi eisini hoyrt um fleiri onnur, sum ætla sær niður at hyggja at dystinum. Tað er sjálvandi hugaligt at frætta, at tey í Klaksvík ikki hava gloymt Toda og meg, og eg vóni, at tað fer at eydnast hjá okkum í Herfølge at vinna meistaraskapin, sigur Jákup Mikkelsen úr Herfølge.

Tað er ikki møguleiki hjá Jákupi at fáa fleiri atgongumerki, og vit skilja á lagnum, at spurningurin, sum greiða skal fáast á, áðrenn fleiri aðrir enn teir, sum Herfølge málverjin longu hevur fingið atgongumerki til fara av landinum, er, um møguleiki er at fáa atgongumerkir til dystin.

Vanliga plagar áskoðaratalið í Herfølge at liggja onkra staðni millum 1500 og 2500. Sunnudagin, tá teir høvdu vitjan av OB, vóru omanfyri hálvt fimta túsund og hugdu at. FCK eigur nógv viðhaldsfólk, so tað er einki at ivast í, at flokkurin verður stórur í Herfølge sunnudagin – eisini føroyingar sum eru búsitandi í danska høvuðsstaðarøkinum.

Sjálvsagt verður tað høvuðsuppgávan hjá Jákupi Mikkelsen og Toda Jónsson í hesi vikuni at fyrireika seg til stóru avbjóðingarnar hóskvøldið og sunnudagin, men um tað skuldi eydnast hjá Herfølge at vunnið meistaraskapin sunnudagin, so verður tað ivaleyst møguligt at heilsa bæði uppá hann og Toda aftaná dystin.

**Lesið inni í ítróttarblaðnum um avrikini hjá føroysku fótbóltsútisetunum í Noregi, Danmark og í Íslandi, har sera væl upplagdi Uni Arge var so óheppin, at hann ikki verður førur fyri at spæla fótbólt næsta mánan.**

# Áskoðari slerdi linjuverjan

*Annar av linjuverjunum í dystinum millum KÍ o g B68 varð sligin íbúkin av áskoðara, tá farið varð til hálvleiks*

Jákup Mørk

At tað ikki hevur gingist eftir vild hjá klaksvíkingum í fótbóltshøpi hetta kappingarárið man ikki vera nøkur loyna.

í landskappingini hevur gingið av skriðuni til, og undan dystinum móti B68 átti besta mansliðið framvegis fyrsta sigurin til góðar.

Hesin kom so til høldar fríggjadagin, men undir dystinum tók ein hending seg upp, sum væl kann vísa seg at fáa avleiðingar fyri KÍ.

### Østust móti endanum

Stutt fyri hálvleik tóku tvær støður seg upp, sum viðførdu, at lagið á áskoðarunum var alt annað enn gott, tá dómarin bríkslaði fyri teimum fyrstu trimum korterunum.

Støðan var 2-0 til heimaliðið, tá dómarin í 39. minutti bríkslaði fyri brotssparki til B68, soleiðis at gestirnir fingu møguleika at minka um munin, og bert tveir minuttir undan steðginum, kom dómarabólkurin aftur í fokus, tá Andrzej Pacek, varð rikin av vølli.

Hetta var heldur meira enn nakrir av áskoðarunum orkaðu at síggja, og tá leikarar og dómarar ætlaðu sær inn at halda hálvleik, var greitt at fleiri vildu hava fatur á dómara og hjálpardómarum, so teir kundu sigga sína hugsan um avrik teirra.

Fyri at forða fyri hesum, varð manngarður gjørdur um dómarabólkin, men sum skilst, so eydnaðist tað kortini einum av áskoðarunum at fáa sent ein neva í búkin á øðrum hjálpardómaranum, Arna Gunnarssyni.

### Fordømi eru

Vit hava frætt, at tilburðurin verður fráboðaður FSF, sum so skal gera av, um og hvussu klaksvíkingar verða revsaðir fyri tilburðin.

í hvussu so er tvey fordømi eru fyri slíkum tilburðum. Í 1977 varð rok í Klaksvík, tá áskoðari leyp inn á vøllin og tók flaggið hjá linjuverjanum, og hetta viðførdi, at KÍ mátti leika næsta dystin á uttanveltaðum vølli. Ta ferðina varð dysturin leiktur í Gøtu, har klaksvíkingar og tvøråmenn leiktu málleysan javnleik.

Í 1986 noyddust leirvíkingar at leika avgerandi dyst um framhaldandi tilveru í bestu deildin inni á Skála, eftir at rok hevði verið um dómarabólkin eftir heimadyst. Valið av vøllinum nervaði tó ikki leirvíkingar, sum við sigri á GÍ megnaðu at varveita sessin í deildini, meðan B36 ístaðin noyddist tungu leiðina í aðru deild.

### ikki fingið málið enn

Ísak Mikladal, aðalskrivari hjá FSF, sigur við Sosialin, at enn hava teir ikki fingið frágreiðingina frá dómarabólkinum, og at hann tískil ikki fær gjørt nakrar viðmerkingar til hetta málið.

Spurdur um, hvørjar avleiðingar atburðurin fær, og um roknast kann við somu revsing, sum í teimum báðum áður nevndu førunum, sigur hann, at hetta veldst um tær frágreiðingar, sum FSF fær frá innblandaðu pørtunum.

- Mannagongdin er tann, at kappingarnevndin tekur málið upp, og verða innblandaðu partarnir síðani bidnir um at geva eina frágreiðing um tilburðin, sigur Ísak Mikladal.

Um vikuskiftið gekk slaturin annars um, at KÍ skuldi spæla teir báðar komandi heimadystirnar í Eiði, men hetta er so í øllum førum ikki avgjørt frá Fótbóltssambandinum, sigur Ísak Mikladal at enda.



*Arni Gunnarsson fekk av at vita, tá hann fríggjadagin var partur av dómarabólkinum í Klaksvík*
***Mynd: Jonhard Hammer***